**Stødd- og hagfrøði fyri lívfrøðingar**

Repetitión í støddfrøði

Lærugreinin "Stødd- og hagfrøði fyri lívfrøðingar" byggir á, at tann lesandi hevur staðið støddfrøði á b-stigi og dugir pensum rættiliga væl.

Tíð er ikki avsett til at repetera miðnámsstøddfrøði í sjálvum skeiðnum. Tað vísir seg, at nógv hava striltið við at fylgja við, tí at tey duga grundleggjandi støddfrøði ov illa. Tað kann eisini vera striltið at fylgja við í útrokningum, sum verða gjørdar í øðrum lærugreinum.

Vit fara tí at hava eitt repetitiónsskeið í støddfrøði, har vit gjøgnum 3 mikudagar repetera tey mest týdningarmiklu evnini í grundleggjandi støddfrøði: Tøl, talmongdir, tallikam; teir 4 roknihættirnir (+, -, *, :); prioritetur av teknum (1. parantes, 2. funktiónstekn, 3. falda & býta, 4. leggja saman & draga frá), brotstrika; líkningar og útsagnir, at loysa líkningar, at umskriva líkningar, implikatión ⇒ og líknandi tekn; o.s.fr., o.s.fr.
Restin av innihaldinum er ikki lagt fast enn. Tað verður tilpassað eftir, hvat tit lesandi tykjast at hava brúk fyri.

Tað er ikki møtiskylda til skeiðið, og ikki er neyðugt við tilmelding, men vit ráða øllum, sum ikki eru sera væl fyri í støddfrøði, til at møta. Ongin próvtøka verður eftir skeiðið, men tit fáa møguleika at avlevera (minst) tvey sett av uppgávum, sum tit fáa aftur við viðmerkingum.

**Undirvísingin verður hesar dagar í septembur 2024:**

**Mikudagin 11. septembur**
**Mikudagin 18. septembur**
**Mikudagin 25. septembur**

**Allir dagar frá kl 9-15. Undirvísingin fer fram í Sjóvinnuhusinum í høli U209.**

Vinaliga

Benadikt Joensen